# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Teir skulu føla, at tað eru føroyingar, sum teir spæla ímóti*

*Mikkjal Thomassen*

# AB fekk ynskisvenjaran

**Sigfríður Clementsen skrivaði í gjárkvøldið undir sáttmála við AB, har hann verður venjari restina av hesum kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki leingi, at AB lá í venjaraloysi. Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at besta boðið upp á nýggjan venjara helst var Sigfríður Clementsen, og tann spádómurin varð staðfestur í gjárkvøldi, tá AB kundi boða frá, at júst Sigfríður varð settur sum venjari.

- Eg havi hildið frí higartil í ár, og eg hava kanska havt ta pausuna, sum skuldi til. Hetta er ein avbjóðing, sum ikki kann sammetast við hana, sum eg hevði í B36. Avbjóðingin er at fáa AB at verða verandi í deildini, segði Sigfriður Clementsen við portalin, tá sáttmálin var undirskrivaður.

Enn er ikki heilt greitt, í hvønn mun hópurin hjá AB verður styrktur, tá flytingarvindeygað letur upp. Einasta, sum er heilt vist, er, at Allan Mørkøre kemur til felagið, og at danski miðvallarin, Peter Christiansen flytur av aftur landinum. Eyðun Dalsgarð, formaður, segði við Sosialinum í gjár, at arbeitt verður við fullari ferð við at styrkja um hópin, og at ætlanin er, at AB skal fáa í minsta lagi tveir spælarar afturar Allani Mørkøre.




*Sigfríður Clementsen er maðurin, sum skal royna at lyfta AB upp um niðurflytingarstrikuna seinastu 16 umførini av Formuladeildini*

AB er í løtuni á 9. plássi í Formula deildini við seks stigum. KÍ og B71 liggja beint oman fyri strikuna við 12 stigum.

### 34 ár og royndur

Hást hann bert er 34 ára gamal, so hevur Sigfríður longu skapt sær eitt veruligt navn innan føroyska fótbóltsheimin. Eftir at hann hevði virkað sum ungdómsvenjari, gjørdist hann í 2003 venjari hjá ÍF, sum tá var í 2. deild. Ætlaða uppflytingin gjørdist veruleiki fyrsta árið, men í fremstu deildini gekk ikki eftir vild, og á sumri 2004 fekk Sigfríður sekkin frá felagnum.

Í 2005 gjørdist hann venjari hjá B36, og hóast fleiri vildu vera við, at tað var rættiliga vágið at seta ein venjari, sum var yngri enn elstu spælararnir í hópinum, so ivaðist eingin, tá árið var av. Saman við Magna Mohr stóð Sigfríður tá nevnliga sum venjari hjá meistarunum, umframt at B36 á sumri gjørdist fyrsta føroyska liðið, sum spældi seg víðari í UEFA-Cup kappingini.

Í fjør endurtók – og betraði - felagið tað bragdið, tá teir spældu seg víðari í europisku meistarakappingini. Í landskappingini vann B36 bronsu, meðan teir tóku gull í steypakappingini við finalusigri á KÍ.

# KÍ annað beinið í finaluni

**B36 kvinnurnar løgdu rygg til 4-0 tap í Klaksvík, meðan tað í hinari hálvfinaluuppgerðini er púra opið eftir fyrra dystin millum AB og GÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað skal vilja heilt illa til hjá KÍ kvinnunum, um tær ikki verða annað liðið í steypafinaluni. Fyrra hálvfinalan millum KÍ og B36 varð spæld í Klaksvík í gjárkvøldi.

Heimaliðið vann 4-0, eftir at tað hevði verið málleyst í 1. hálvleiki.

Sigrid Jacobsen setti hol á smáar tíggju minuttir eftir hvíldina, og so skoraðu Vivian Bjartalíð og Bára S. Klakstein, sum skoraði tvær ferðir. Í 2. hálvleiki var KÍ yvirvágin ógvuliga stór, og hesum megnaði annars so stinna B36-verjan ikki at standa ímóti.

Hetta var triðja ferðin, at KÍ spælir móti B36 í ár. Í Havn hevur B36 fingið fýra av seks stigum móti meistarunum, men KÍ-sigurin hesa ferð prógvaði so ruddiliga, at KÍ-kvinnurnar avgjørt ikki ætla at lata meistaraheitið frá sær uttan víðari.

Í hinari hálvfinaluni vann AB á heimavølli 4-3 á GÍ, og tí er púrasta opið undan seinnu hálvfinaluni teirra millum.

Seinnu hálvfinalurnar verða mikudagin 13. juni. Finalan verður sunnudagin 1. juli.



# Skotar stóðu royndina

**Skotar vunnu í gjárakvøldið ein linligan vinardyst ímóti Eysturríki, og eru nú klárir til at møta føroyska landsliðnum komandi mikudag**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Seinasta hond varð løgd á fyrireikingarnar hjá skotska landsliðnum, tá ið liðið í gjárkvøldið var í Eysturríki og spældi venjingardyst. Gaman í vann Skotland dystin, men spælið hjá skotsku manningini hekk als ikki væl saman. Kanska ein avleiðing av, at fleiri av vanliga føstu spælarunum høvdu givið avboð vegna skaðar.

Einsamalla málið í dystinum skeyt Garry O'Connor, tá gott korter var farið av sienna hálvleiki.

Tað er heilt vist, at skotar ikki undirmeta Føroyar. Hetta váttaði eisini skotski venjari, Alex McLeish, eftir dystin.

- Vit hava jú verið har fyrr, og vit vita hvussu tað er. Vit fáa ein torføran dyst, segði venjarin við Sky-Sports, og vísti á, hvussu vánaligt graslíkið er á Svangaskarði. Okkurt bendir á, at McLeish hevur sæð dystin millum Føroyar og Ukraina fyrr í ár, tá ið graslið á vøllinum var nærri líkt einum svínastalli.

Tað skal tó leggjast afturat, at toftamenn hava gjørt eitt stórt arbeiði síðani tá. Sum skilst, so er grasið á Svangaskarði sum fyrsta dagin, hóast Ukraina-dysturin fór ógvuliga illa við undirlagnum.